# Fótbúni: Triðja ættar

**Nú tað verður so nógv tosað um, at føroyingar í Danmark hava so lítlan hug at venda aftur til Føroyar, er tað hugaligt at kunna hava eina søgu um, at hetta kortini hendir. Talan er um Súsan og Bjarni Joensen, sum saman við teirra tveimum børnum hava avgjørt at koma aftur til Føroya eftir 9 ár í Danmark**



*Trý ættarlið. F.v. Marjun við Silas, Hans Pauli, beiggi Marjun, Bjarni, Barbara og Súsan.*

## Samrøða



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Súsan og Bjarni skulu yvirtaka skósøluna Fótbúni eftir mammu hansara Marjun, sum nú heldur, at tíðin er komin at lata yngra ættarliðið taka við.

Hervið er Bjarni triðja ættarlið í hesi "skógvaætt". Tann fyrsti í røðini var Karl Joensen. Hann var ættaður av Eiði, sonur Jógvan í Skorini og Marsannu, sum var ættað úr Funningi .

Tey vóru sjey systkin. Teir vóru fýra brøður Rasmus, Eliesar, Edvard og Karl. Systrarnar vóru Anna Sofía, Elisabeth og Karin.

Tveir av brøðrunum og ein bróðursonur gjørdust skómakarar. Eliesar fór til Klaksvíkar, har hann fór at arbeiða sum skómakari. Her kom hann at vera kendur sum Skós, og framvegis er skógvaforrætning hjá hansara eftirkomarum, sum eisini kallast Skós, í miðbýnum í Klaksvík. Jógvan, sonur Rasmus, sum fekk sær Skorheim til eftirnavn, gjørdist eisini skómakari í Klaksvík.

Karl var føddur í 1910, og hjá einum bygdardrongi tá í tíðini var ikki so nógv at velja í uttan at fara til skips. Karl vildi hava okkurt annað at dúva á, og hann fór tískil til Klaksvíkar at læra til skómakara hjá beiggja sínum Eliesari. Karl fór aftur til Eiðis, og tey fyrstu árini skósaði hann um veturin og var til skips um summarið. Sum nógvir eiðismenn og millum hesar eisini beiggjar hjá honum, sigldi hann við Bartal í Kass av Strondum. Fyrstu tvey árini við Fagranes og síðan níggju ár við Austerlitz.

Karl hevði nógv at gera við at umvæla skógvar, tá ið hann var heima. Tað var so nógv, at onkuntíð plagdi Edvard beiggin, at hjálpa honum. Hann sigldi eisini nógv ár við Bartal.

Her gekk eisini nógv fólk inn á verkstaðið bert fyri at práta. Tað var ofta ein serligur hugni við skómakaraverkstøðum. Hetta var eitt arbeiði, har tað væl bar til bæði at práta og arbeiða í senn. Tí komu fólk ofta inn á gólvið at fáa eitt prát.

### Yvirlivdi eitt forliss, slapp undan tí næsta

Aftaná Austerlitz fór Karl at sigla við trolara, og skógvarnir vórðu hesa tíðina settir á hyllina.

Hann fór at sigla við Tór 1. Men nú er kríggið komið, og harvið var tað vandafult at sigla. Hetta kom Karl skjótt at merkja.

Longu tann 10. desember 1940 fekk Tór 1 eina minu í trolið, tá ið teir fiskaðu nær Glettingarnes undir Íslandi. Minan sprongdist, og skipið fekk so stóran leka, at tað sakk. Teir vóru 18 mans við. Millum hesar var beiggin Rasmus. Annar bjargingarbáturin var brotin, men øll manningin slapp í hin. Teir róðu so til lands og komu til Brúnavík norðanfyri Glettingarnes 5 tímar seinni. Hetta var fyrsti trolarin, sum fórst av krígsávum.

Seinni fekk Karl í boði at fara við Tór 2. Men hann hevði fingið ein slíkan hvøkk, at hann aftaná hesa hending ikki kundi sova umborð á skipi. Beiggi hansara Rasmus var tá við. Hann helt við Karl, tá ið hann sýtti fyri at koma við: "Hatta gjørdi tú býtt."

Tór 2 varð hendan túrin torpederaður av týskum kavbáti. Tað eydnaðist sum við einum undri trimum monnum at bjarga sær, meðan 18 menn druknaðu. Rasmus var ein teirra. Tað verður sagt, at veruliga var tað sonur hansara Poul, sum átti kjansin, og at Rasmus var farin við fyri Poul. Men soleiðis vildi lagnan tað hjá teimum báðum. Rasmus slapp undan fyrru ferð men ikki seinnu ferð. Tað sama var við skiparanum á Tór 1, Hans Poulsen. Hann var ein av teimum 21 monnunum, sum doyðu við Nýggjaberg, sum fekk somu lagnu sum Tór 2 í 1942.

### Nú gjørdist tað skógvarnir

Nú var so liðugt hjá Karl at hugsa um sjólívið. Hereftir skuldi tað vera skógvarnar, hann helt seg til.

Spurningurin var, um hann skuldi fara til Havnar ella Klaksvíkar at arbeiða. Tað gjørdist Havnin. Her útvegaði hann sær eini summarhús við trøð uppi á Villingardalsvegnum. Seinni varð bygt uppí, og her byrjaði hann at forsolla. Umframt hevði hann tvær kýr. Hann fekk sær eisini hønur, einar 5-600 í tali. Eggini vórðu seld í handlunum í Havn.



*Karl og Hanna*

Karl giftist við Honnu Dortheu Poulsen, hon var dóttir Víka Andreu og Hanus í Pállshúsi á Eiði. Hanus gekk burtur við vestmannasluppini Doru á heysti 1931.

Karl og Hanna Dorthea fingu børnini Hans Paula, Egil, sum doyði í 1976, sama ár sum mamman, Rannvá, sum býr í Klaksvík og so Marjun.

Villingardalsvegur, sum tá meira enn nú var langt av landi skotin, var ov óhøgligt hjá kundunum. Tí var skipað so fyri, at skógvarnir kundu latast inn og heintast í Skipshandlinum hjá svágrinum Dánjal Jakku. Hann var giftur við systrini Onnu Sofíu, sum gjørdist 100 ár. Dánjal Jakku seldi eisini egg fyri Karl.

Hans Pauli minnist, at tað millum annað var hansara uppgáva at bera skógvarnar ímillum, til gongu sjálvandi. Hann minnist millum annað kokkin á Argjum, sum nýtti ortopediskar skógvar. Teir vóru so tungir, at hann orkaði bert at bera ein skógv í senn! Tískil mátti gangast tvær ferður bert við hesum eina parinum.

Í 1947 flytir Karl skósmiðjuna